# Løgmansskrivstovan

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 10.08.2022 |
| Mál nr.: | 22/14559 |
| Málsviðgjørt: | NF |
| Ummælistíð: | 11.08-12.09.2022 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Løgtingslóg um broyting í ymsum løgtingslógum í sambandi við umskipan av Føroya Kærustovni
(Avtøka av kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini, Høvuðsbarnaverndarnevndini og Tvingsilsnevndini)

*Arbeiðsloysis- og barsilsmál*

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS-lógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 177 frá 17. desember 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 26, stk. 1, 1. pkt. verður "kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**2.** Í § 26, stk. 1, 2. pkt. verður "kærunevndini" broytt til: "Føroya Kærustovni".

**3.** Í § 26, stk. 2 verður í 1. pkt. "kærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn" og í 2. pkt. verður "Kærunevndin" broytt til: Føroya Kærustovnur".

**4.** § 26, stk. 3 og 4 verður strikað.

**§ 2**

Í løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 174 frá 21. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 25 a, stk. 1, 1. pkt. verður "kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**2.** Í § 25 a, stk. 1, 2. pkt. verður "kærunevndini" broytt til: "Føroya Kærustovni".

**3.** Í § 25 a, stk. 2 verður í 1. pkt. "kærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn" og í 2. pkt. verður "Kærunevndin" broytt til: Føroya Kærustovnur".

**4.** § 25 a, stk. 3-5 verður strikað.

*Høvuðsbarnaverndarmál*

**§ 3**

Í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Yvirskriftin yvir § 11 verður orðað soleiðis:
*"Høvuðsbarnaverndarmál"*

**2.** Í § 11, stk. 1 verður "Landsstýrismaðurin setur eina Høvuðsbarnaverndarnevnd til at taka" broytt til: "Føroya Kærustovnur tekur".

**3.** Í § 11, stk. 2, § 15 a, stk. 1 og 2, § 15 b, stk. 2, § 19, stk. 1, § 22, stk. 2-3, tvær staðni í stk. 4 og í stk. 5-7, § 23, stk. 1, § 24, tvær staðni í stk. 2 og tvær staðni í stk. 3, § 24 a, stk. 1-5, § 24 b, stk. 3, § 24 f, tvær staðni í stk. 1, § 35, stk. 1, 2. pkt. og stk. 2, § 37, stk. 1-3, § 55, stk. 1 og 2, § 56, § 57, stk. 3 og 5, § 63 a, stk. 5, § 71, stk. 1 og § 74, stk. 2 verður "Høvuðsbarnaverndarnevndin" broytt til: "Føroya Kærustovnur".

**4.** Í § 11, stk. 3, § 17, stk. 3, § 18, stk. 3, § 20, stk. 3, § 24, stk. 1, § 24 a, stk. 4, § 24 b, stk. 2, § 24 d, stk. 3, § 43, stk. 1, § 52, stk. 1-6 og § 54, stk. 1 verður "Høvuðsbarnaverndarnevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**5.** § 12 verður strikað.

**6.** Í § 24 a, stk. 1 og 2, § 24 b, stk. 1, § 24 d, stk. 1, § 35, stk. 1, 1. pkt. og stk. 3, § 52, stk. 4 og 6, § 64, stk. 1 og § 74, stk. 1 og 2 verður "Høvuðsbarnaverndarnevndini" broytt til: "Føroya Kærustovni",

**7.** Í § 24 b, stk. 3 verður "hesi nevnd" broytt til: Føroya Kærustovni".

**8.** § 51, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Øll, sum útinna tænastu ella arbeiði fyri eina fyrisiting ella stovn eftir hesi løgtingslóg, fyri Føroya Kærustovn ella eru limir í eini barnaverndarnevnd, hava tagnarskyldu sambært kapitli 8 í fyrisitingarlógini um tagnarskyldu v.m."

**9.** Í yvirskriftini til kapittul 8 verður "**Høvuðsbarnaverndarnevndina"** broytt til: "**Høvuðsbarnaverndarmál**".

**10.** Yvirskriftin yvir § 53 og § 53 verður strikað.

**11.** Í § 55, stk. 3 verður "Formaðurin í Høvuðsbarnaverndarnevndini" broytt til: "Føroya Kærustovnur".

**12.** Í § 57, stk. 3 verður "nevndin" broytt til: "Føroya Kærustovnur", og í stk. 5 verður "nevndini" broytt til: "Føroya Kærustovni".

**13.** Í § 69, stk. 1 verður "fyri stovnsetan og rakstur av Høvuðsbarnaverndarnevndini og" strikað.

**§ 4**

Í løgtingslóg nr. 42 frá 30. apríl 2018 um ættleiðing (Ættleiðingarlógin), sum seinast

broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 10, stk. 2 og § 11 verður "Høvuðsbarnaverndarnevndini" broytt til: "Føroya Kærustovni".

**2.** Í § 13 verður "Høvuðsbarnaverndarnevndin" broytt til: "Føroya Kærustovnur".

*Tvingsilsmál innan almannaøkið*

**§ 5**

Í løgtingslóg nr. 73 frá 25. mai 2020 um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 3, stk. 3, § 8, stk. 2, § 28, stk. 6 og § 30, stk. 1, 1. pkt. verður "tvingsilsnevndini" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**2.** Yvirskriftin yvir § 4 verður orðað soleiðis:
"*Tvingsilsmál*"

**3.** § 4 verður orðað soleiðis:

"**§ 4.** Føroya Kærustovnur tekur avgerð um góðkenning av inntrivi sambært hesi løgtingslóg og góðkenning sambært § 51, samanber § 50, í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur. Avgerð um góðkenning verður framd við støði í tilmæli sambært § 24 í hesi løgtingslóg og § 51 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur. Harumframt tekur Føroya Kærustovnur avgerð í kærumáli sambært § 30. Eisini tekur Føroya Kærustovnur avgerð um gildistíð á inntrivi, samanber § 29.
*Stk. 2.* Í málum viðvíkjandi §§ 10, 13, 14 og 25 og kapitlunum 4 og 5 skal avgerðin hjá Føroya Kærustovni vera tikin skjótast gjørligt og í seinasta lagi 14 dagar eftir, at tilmælið sambært § 24 er móttikið.
*Stk. 3.* Í øðrum málum skal skal avgerðin hjá Føroya Kærustovni vera tikin í seinasta lagi 30 dagar eftir, at tilmæli sambært § 24, kæra sambært § 24, stk. 4 ella tilmæli sambært § 51 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur er móttikið. Er avgerð ikki tikin innan nevndu freist, skal avgerðin verða tikin skjótast gjørligt, og orsøkin fráboðast myndugleikanum og avvarðandi pørtum.
*Stk. 4.* Føroya Kærustovnur førir yvirlit yvir avgerðir um góðkenning, móttiknar fráboðanir og frágreiðingar sambært hesi løgtingslóg og greinar og lýsir hesar árliga í ársfrágreiðing.

**4.** Í § 8, stk. 1, § 9, stk. 1, §§ 10 og 11, § 12, stk. 1, § 13 stk. 1, 2 og 4, §§ 14-16, § 17 stk. 1 og 3, § 18, stk. 1 og 2, § 19, § 20, stk. 1 og 3, § 21, stk. 1, § 22, stk. 1, § 23, stk. 1, § 24, stk. 1-4, § 25, § 26, stk. 1 og 2 og § 30, stk. 2-4 verður "tvingsilsnevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**5.** Í § 29, stk. 1, § 30, stk. 1, 2. pkt., tvær staðni í stk. 2, stk. 3, 2. pkt. og stk. 4, 2. pkt. verður "tvingsilsnevndin" broytt til: "Føroya Kærustovnur".

**6.** Í § 30, stk. 1 verður "nevndin" broytt til: "Føroya Kærustovnur".

**§ 6**

Í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verður í § 50, stk. 1 og § 51, stk. 1 "tvingsilsnevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**§ 7**

Í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 39, stk. 5 og § 64 a verður "tvingsilsnevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**2.** Yvirskriftin yvir § 64 a verður orðað soleiðis:

"*Tvingsilsmál*"

*Gildiskoma*

**§ 8**

*Stk. 1.* §§ 1 og 2 í hesi løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2023.
*Stk. 2.* §§ 3 og 4 í hesi løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2023.
*Stk. 3.* §§ 5-7 í hesi løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Løgtingið samtykti í november 2021 uppskot til løgtingslóg um Føroya Kærustovn. Sí LM-007/2021.

Endamálið við *løgtingslóg nr. 147 frá 25. november 2021 um Føroya Kærustovn* er at skipa Kærustovnin sum sjálvstøðugan og óheftan myndugleika. Hetta hevur við sær, at 11 kærunevndir og aðrar nevndir, sum Føroya Kærustovnur er skrivstova hjá, verða tiknar av yvir eitt tíðarskeið uppá 2 ár, og at ein kærunevnd, Fjølmiðlanevndin, verður flutt.

Sambært *løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021 um broyting í ymsum løgtingslógum í samband við umskipan av Føroya Kærustovni* vórðu Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum, Skatta- og avgjaldskærunevndin og Kærunevndin hjá Studna tiknar av og virkisøkið flutt til Føroyar Kærustovn tann 1. januar 2022.

Sambært *løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022 um broyting í ymsum løgtingslógum o.tíl. í samband við umskipan av Føroya Kærustovni* vórðu Kærunevndin í lendismálum, Vinnukærunevndin og Skuldarumskipanarnevndin tiknar av og virkisøkið flutt til Føroyar Kærustovn tann 1. juli 2022.

Sambært § 16, stk. 3 í *løgtingslóg um Føroya Kærustovn* verða hesar kærunevndir tiknar av og virkisøkið flutt til Føroya Kærustovn tann 1. januar 2023:

1) Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini, ALS.
2) Kærunevndin hjá Barsilsskipanini.

Sambært § 16, stk. 4 í *løgtingslóg um Føroya Kærustovn* verður Høvuðsverndarnevndin tikin av og virkisøkið flutt til Føroya Kærustovn tann 1. juli 2023.

Neyðugu fylgibroytingarnar í samband við at Psykiatriska sjúklingakærunevndin verður tikin av og virkisøkið flutt til Føroya Kærustovn tann 1. juli 2023, verða gjørdar við lógarbroyting í *anordning nr. 185 frá 13. mars 2009 om ikrafttræden for Færøerne af lov om anvendelse af*

*tvang i psykiatrien*. Heilsumálaráðið leggur ríkislógartilmæli um hetta fyri Løgtingið í hesi tingsetuni.

Sambært § 16, stk. 5 verður Tvingsilsnevndin tikin av og virkisøkið flutt til Føroya Kærustovn 1. januar 2024.

Í hesum sambandi er tað neyðugt at gera broytingar í teimum lógunum, sum hesar nevndirnar fevna um. Talan er um lóggávu á málsøkinum hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum og Almannamálaráðnum.

Avtalað er við stjórnarráðini, at Løgmansskrivstovan ger hesar fylgilógarbroytingarnar í samband við umskipan av Føroya Kærustovni, so tær verða gjørdar eftir sama leisti.

Við hesum lógaruppskotinum eru allar fylgibroytingarnar á yvirtiknum málsøkjum gjørdar í sambandi við umskipan av Føroya Kærustovni.

## 1.2. Galdandi lóggáva

### 1.2.1. Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini

Sambært galdandi lóggávu viðger Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini kærur um avgerðir, ið Arbeiðsloysisskipanin tekur við heimild í ALS-lógini. Talan kann t.d. vera um avgerðir hjá Arbeiðsloysisskipanini viðvíkjandi afturgjaldi av ov nógv útgoldnum arbeiðsloysisstuðli, avgerðir um karantenu í Arbeiðsloysisskipanini, avgerðir í sambandi við feriu í Arbeiðsloysisskipanini ella aðrar avgerðir hjá Arbeiðsloysisskipanini tiknar við heimild í ALS-lógini.

Harumframt viðger kærunevndin kærur um avgerðir, sum TAKS tekur við heimild í lógini um Barsilsskipan. Talan kann t.d. vera um avgerðir hjá TAKS viðvíkjandi útgjaldi úr Barsilsskipanini, avgerðir um útrokningargrundarlagið á barsilsgjaldinum, avgerðir um frítøku at rinda til Barsilsskipanina ella aðrar avgerðir hjá TAKS tiknar við heimild í lógini um Barsilsskipan.

Í ársfrágreiðingini hjá Føroya Kærustovni fyri 2021 sæst, at í 2021 komu 5 nýggjar kærur til Kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini. Tríggjar av kærunum snúðu seg um arbeiðsloysisstuðul og tvær um barsilskipanina. Talið av kærum nakað lægri enn í 2020, tá 8 nýggjar kærur komu inn. Ársfrágreiðingin kann lesast her: kaerustovnur-aarsrapport-2021.pdf (cdn.fo)

### 1.2.2. Høvuðsbarnaverndarnevndin

Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur avgerðir grundaðar á tilmæli frá barnaverndartænastunum kring landið. Talan kann t.d. vera um, at barnaverndartænasta sendir tilmæli til Høvuðsbarnaverndarnevndina um umsorganaryvirtøku av barni. Høvuðsbarnaverndarnevndin viðger tilmælið og tekur síðani avgerð í málinum. Partarnir – ella umboð teirra vegna – fáa høvi at møta á fundi til tess at greiða frá sjónarmiðum teirra. Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur avgerð í málum viðvíkjandi: Umsorganaryvirtøku, samverurætt, familjuviðgerð á stovnum hjá landinum, dag- og samdøgurstilboð á stovnum hjá landinum, har samtykki ikki er fingið frá foreldramyndugleikanum ella barni yvir 15 ár og rættin til ókeypis umboðan í omanfyrinevndu málum

Í ársfrágreiðingini hjá Føroya Kærustovni fyri 2021 sæst, at í 2021 vórðu tilsamans 129 mál móttikin og viðgjørd í Høvuðsbarnaverndarnevndini. Talið av málum samsvarar hvørki við talið av avgerðum ella talið av børnum, tí sama mál kann til dømis fevna um bæði umsorganaryvirtøku og samveru við ymiskar partar, ella um familjuviðgerð til eina familju við fleiri børnum. Harumframt kann tilmæli viðvíkjandi einum barni verða lagt fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til støðutakan fleiri ferðir um árið. Í 2021 tók Høvuðsbarnaverndarnevndin tilsamans 272 avgerðir. Tiknu avgerðirnar í 2021 snúðu seg um 104 børn. Ársfrágreiðingin kann lesast her: kaerustovnur-aarsrapport-2021.pdf (cdn.fo)

1.2.3. Tvingsilsnevndin

Tvingsilsnevndin byrjaði virksemi sítt 1. januar 2021. Tvingsilsnevndin hevur víttfevnandi málsøki, ið fevnir um bæði nógv og ymisk mál. Tvingsilsnevndin tekur bæði støðu til, um tilmæli um tvingsilsinntriv frá kommunum og Almannaverkinum kunnu góðkennast, samstundis sum nevndin eisini viðger kærur um framd tvingsilsinntriv og ávísar avgerðir hjá myndugleikunum.

Tvingsilsnevndin viðger tilmæli um: Flyting uttan samtykki, ávaringar- og peilingarskipan, serlig upplatingarskipan til úthurð, halda persóni aftur og føra hann aftur, halda persóni føtum í sambandi við reinføri o.a., nýtsla av hjálparráði, forða fyri atgongd til og eftirlit við nýtslu av internet og telefon, kanning av býli og ognarlutum, leggja hald á ognarlutir og læsa býli um náttina.

Í ársfrágreiðingini hjá Føroya Kærustovni fyri 2021 sæst, at í 2021 komu 14 mál til Tvingsilsnevndina og snúðu øll málini seg um tilmæli til góðkenningar, meðan eingin kæra er móttikin. 2021 er fyrsta árið, har Tvingsilsnevndin virkar og tískil eru sjálvsagt ikki onnur ár at samanbera við. Ársfrágreiðingin kann lesast her: kaerustovnur-aarsrapport-2021.pdf (cdn.fo)

## 1.3. Endamálið við uppskotinum

Talan er um fylgilógarbroytingar í sambandi við umskipan av Føroya Kærustovni. Endamálið við uppskotinum er at flyta tær heimildir, sum Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini, Høvuðsbarnaverndarnevndin og Tvingsilsnevndin í dag hava, til Kærustovnin. Tað merkir, at Kærustovnurin frameftir skal viðgera og taka avgerð í kærumálum og málum, sum hoyra til hesar tríggjar nevndirnar.

## 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Í 7 ymiskum løgtingslógum verður skotið upp at broyta ásetingar í hesum lógunum soleiðis, at har sum tað í dag er ásett, at kærast kann Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini ella mál leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndin ella Tvingsilsnevndin, skal tað frameftir vísast til Føroya Kærustovn sum kærumyndugleika, tá ið talan er um kærumál, og til Føroya Kærustovn sum myndugleika, tá ið talan er um avgerð ella góðkenning við tað at avgerðarmyndugleikin hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini og Tvingsilsnevndini verður fluttur til Føroya Kærustovn.

Felags fyri hesa kærunevnd og hesar nevndir er, at serkunnleiki er týðandi í viðgerðini av málunum, sum kærunevndin og nevndirnar viðgera. Tað er tí ásett í *kunngerð nr. 161 frá 14. desember 2021 um starvsskipan fyri Føroya Kærustovn*, at serkøn ráðgeving skal taka avgerð

saman við Føroya Kærustovni í Arbeiðsloysisskipanarmálum, Høvuðsbarnaverndarmálum og Tvingsilsmálum. Hetta er nærri greitt frá undir serligu viðmerkingunum.

Tær 7 løgtingslógirnar eru á málsøkjunum hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum og Almannamálaráðnum. Í klombrum verður víst til greinina í lógaruppskotinum, sum broytir lógina.

Á málsøkinum hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum:

*Arbeiðsloysismál*
Løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (§ 1)

*Barsilsmál*
Løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan (§ 2)

Á málsøkinum hjá Almannamálaráðnum:

*Høvuðsbarnaverndarnevndin*
Løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd (§ 3)
Løgtingslóg nr. 42 frá 30. apríl 2018 um ættleiðing (Ættleiðingarlógin) (§ 4)

*Tvingsilsnevndin*
Løgtingslóg nr. 73 frá 25. mai 2020 um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin (§ 5)
Løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur (§ 6)
Løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, (§ 7)

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið hevur í tíðarskeiðnum 11. august til 12. september 2022 verið til ummælis hjá:

- Umhvørvis- og vinnumálaráðnum
- Almannamálaráðnum
- Arbeiðsloysisskipanini, ALS
- Føroya Kærustovni
- Kommunufelagnum

Uppskotið hevur harafturat ligið til almenna hoyring á hoyringarportalinum hjá landsstýrinum.

Ummæli kom frá....

*Løgmansskrivstovan skal viðmerkja, ....*

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Tó so at fyri teir myndugleikar, sum umsita lógirnar, og fyri onnur, verður rættarstøðan greiðari, tá ið neyðugu fylgibroytingarnar verða gjørdar, soleiðis at veruliga rættarstøðan framgongur av tí einstøku lógini.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir. Tó so at fyri tey, sum brúka og umsita lógirnar, og fyri onnur, verður arbeiðið lættari, tá ið veruliga rættarstøðan framgongur av tí einstøku lógini.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á hesum økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, sum Føroyar hava skyldu at fylgja. Uppskotið hevur tí ikki fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar grundað á skyldur í millumtjóðasáttmála.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið er ikki í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan, Evropeiska mannarættindasáttmálan, EMRS, ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Uppskotið hevur tí ikki fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar grundað á skyldur í millumtjóðasáttmála.

### 2.9. Markaforðingar
Tað eru ongar kendar markaforðingar, og lógaruppskotið elvir ikki til nýggjar markaforðingar, av tí at talan er um fylgibroytingar í samband við umskipan av Føroya Kærustovni, sí LM-007/2021.

### 1.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting ella onnur størri inntriv.

### 2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skatt ella avgjøld.

### 2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki nýggjar skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ongar heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Nei.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til §§ 1-2**
Hetta er lóggáva á málsøkinum hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum.

Sambært galdandi lóggávu viðger Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini kærur um avgerðir, ið Arbeiðsloysisskipanin tekur við heimild í ALS-lógini. Talan kann t.d. vera um avgerðir hjá Arbeiðsloysisskipanini viðvíkjandi afturgjaldi av ov nógv útgoldnum arbeiðsloysisstuðli, avgerðir um karantenu í Arbeiðsloysisskipanini, avgerðir í sambandi við feriu í Arbeiðsloysisskipanini ella aðrar avgerðir hjá Arbeiðsloysisskipanini tiknar við heimild í ALS-lógini.

Harumframt viðger kærunevndin kærur um avgerðir, sum TAKS tekur við heimild í lógini um Barsilsskipan. Talan kann t.d. vera um avgerðir hjá TAKS viðvíkjandi útgjaldi úr Barsilsskipanini, avgerðir um útrokningargrundarlagið á barsilsgjaldinum, avgerðir um frítøku at rinda til Barsilsskipanina ella aðrar avgerðir hjá TAKS tiknar við heimild í lógini um Barsilsskipan.

Ásett verður, at avgerðir sambært hesum lógunum kunnu kærast til Føroya Kærustovn í staðin fyri til kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini.

Í viðmerkingunum til løgtingslóg um Føroya Kærustovn varð sagt soleiðis:

"Arbeiðsloysisskipanin er ein serlig skipan, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum varða av. Tað hevur stóran týdning fyri kærumálsviðgerðina, at tey,sum taka avgerð í hesum málum, hava gott innlit í arbeiðsmarknaðin, sáttmálar og lóggávu. Yrkisfakliga umboðanin hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum í viðgerðini av kærumálum innan hetta økið er tí sjálvsøgd og eigur at halda fram sum nú, bæði fyri at tryggja fakliga grundaðar avgerðir, fakligt trúvirði og undirtøku fyri skipanini. Løgfrøðiligi kunnleikin er á Kærustovninum, og tí verður mett, at hetta økið kann skipast soleiðis, at løgfrøðingar á Kærustovninum taka avgerð í hesum málum saman við teimum neyðugu serkønu, sum hava hollankunnleika til kollektiva sáttmálaøkið."

Hetta sæst aftur í kunngerð nr. 161 frá 14. desember 2021 um starvsskipan fyri Føroya Kærustovn, har tað í § 12 um Arbeiðsloysisskipanarmál stendur, at serkøn ráðgeving í arbeiðsloysisskipanarmálum verður veitt av persónum við serligum kunnleika til arbeiðsmarknaðarmál, ein umboðandi løntakarar og ein umboðandi arbeiðsgevarar. Eisini er ásett at tey serkønu taka avgerðir í arbeiðsloysisskipanarmálum saman við Føroya Kærustovni.

Broytingin kemur í gildi 1. januar 2023.

**Til §§ 3-4**
Hetta er lóggáva á málsøkinum hjá Almannamálaráðnum.

Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur avgerðir grundaðar á tilmæli frá barnaverndartænastunum kring landið. Talan kann t.d. vera um, at barnaverndartænasta sendir tilmæli til Høvuðsbarnaverndarnevndina um umsorganaryvirtøku av barni. Høvuðsbarnaverndarnevndin viðger tilmælið og tekur síðani avgerð í málinum. Partarnir – ella umboð teirra vegna – fáa høvi at møta á fundi til tess at greiða frá sjónarmiðum teirra.

Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur avgerð í málum viðvíkjandi: Umsorganaryvirtøku, samverurætt, familjuviðgerð á stovnum hjá landinum, dag- og samdøgurstilboð á stovnum hjá landinum, har samtykki ikki er fingið frá foreldramyndugleikanum ella barni yvir 15 ár og rættin til ókeypis umboðan í omanfyrinevndu málum

Ásett verður, at avgerðir sambært hesum lógunum skulu takast av Føroya Kærustovn í staðin fyri Høvuðsbernaverndarnevndina.

Í viðmerkingunum til løgtingslóg um Føroya Kærustovn varð sagt soleiðis um hesi mál:

"Barnaverndarøkið er so mikið serligt, at tað verður ikki mett nóg mikið at hava serkøn sum ráðgevandi, tá ið avgerð skal takast í hesum málum. Mett verður neyðugt at hava serkøn sum part av avgerðarmyndugleikanum. Nøkur mál kunnu verða avgjørd út frá skrivligum tilfari, men flestu mál verða viðgjørd á samráðingarfundum, har partarnir fáa høvi at møta fyri nevndini. Nevndarlimirnir fáa høvi at spyrja bæði barnaverndartænastuna um hennara tilmæli og hoyra foreldrini, áðrenn niðurstøða verður gjørd. Neyðugt er tískil at hava serkøn sum part av avgerðarmyndugleikanum á hesum øki. Løgfrøðiligi kunnleikin er á Kærustovninum, og tí verður mett, at hetta økið kann skipast soleiðis, at løgfrøðingar á Kærustovninum taka avgerð í hesum málum saman við teimum neyðugu serkønu, so sum sálarfrøðingi og barnaserkønum."

Hetta sæst aftur í kunngerð nr. 161 frá 14. desember 2021 um starvsskipan fyri Føroya Kærustovn, har tað í § 11 um Høvuðsbarnaverndarmál stendur, at serkøn ráðgeving í høvuðsbarnaverndarmálum verður veitt av persóni, sum er sálarfrøðingur ella barnaserkønur. Eisini er ásett, at tey serkønu taka avgerðir í Høvuðsbarnaverndarmálum saman við Føroya Kærustovni.

Broytingin kemur í gildi 1. juli 2023.

**Til §§ 5-7**
Hetta er eisini lóggáva á málsøkinum hjá Almannamálaráðnum.

Tvingsilsnevndin byrjaði virksemi sítt 1. januar 2021. Tvingsilsnevndin hevur víttfevnandi málsøki, ið fevnir um bæði nógv og ymisk mál. Tvingsilsnevndin tekur bæði støðu til, um tilmæli um tvingsilsinntriv frá kommunum og Almannaverkinum kunnu góðkennast, samstundis sum nevndin eisini viðger kærur um framd tvingsilsinntriv og ávísar avgerðir hjá myndugleikunum.

Tvingsilsnevndin viðger tilmæli um: Flyting uttan samtykki, ávaringar- og peilingarskipan, serlig upplatingarskipan til úthurð, halda persóni aftur og føra hann aftur, halda persóni føtum í sambandi við reinføri o.a., nýtsla av hjálparráði, forða fyri atgongd til og eftirlit við nýtslu av internet og telefon, kanning av býli og ognarlutum, leggja hald á ognarlutir og læsa býli um náttina.

Í viðmerkingunum til løgtingslóg um Føroya Kærustovn varð sagt soleiðis um hesi mál:

"Tvingsilsnevndin hevur víttfevnandi málsøki, ið fevnir um bæði nógv og ymisk mál. Tvingsilsnevndin tekurstøðu til, um tilmæli um tvingsilsinntriv frá kommunum og Almannaverkinum kunnu góðkennast, samstundis sum nevndin eisini viðger kærur um framd tvingsilsinntriv og ávísar avgerðir hjá myndugleikunum. Enn hevur nevndin ikki virkað so

leingi, og tí eru royndirnar hjá Kærustovninum við hesi nevndini enn sera avmarkaðar. Mett verður, at virksemið hjá hesi nevndini í fleiri førum kann javnmetast við virksemið hjá Psykiatrisku Sjúklingakærunevndini, sum Kærustovnurin hevur verið skrivstova hjá síðani 2009. Løgfrøðiligi kunnleikin er á Kærustovninum, og tí verður mett, at eisini hetta økið kann skipast soleiðis, at løgfrøðingar á Kærustovninum taka avgerð í hesum málum saman við teimum neyðugu serkønu."

Hetta sæst aftur í kunngerð nr. 161 frá 14. desember 2021 um starvsskipan fyri Føroya Kærustovn, har tað í § 13 um tvingsilsmál stendur, at serkøn ráðgeving í tvingsilsmálum verður veitt av persóni, sum er: 1) sálarfrøðingur, 2) sjúkrarøktarfrøðingur, 3) heilsufrøðingur, 4) námsfrøðingur, 5) serlækni í psykiatri, ella 6) heilsurøktari. Eisini er ásett at viðkomandi serkøn taka avgerð í tvingsilsmálum saman við Føroya Kærustovni, og at tað vanliga er nóg mikið, at ein av teimum serkønu, nevnd í nr. 1-6, er við at taka avgerð.

Broytingin kemur í gildi 1. januar 2024.

**Til § 8**
Av praktiskum orsøkum verða tær seinastu fylgibroytingarnar, sum skulu gerast í samband við umskipan av Føroya Kærustovni, gjørdar samlaðar í hesum lógaruppskotinum.

Av hesi orsøk koma partar av løgtingslógini í gildi ymiskar tíðir, so hvørt sum kærunevnd ella nevnd verður tikin av.

§§ 1 og 2, sum eru fylgibroytingarnar viðvíkjandi Kærunevndini hjá Arbeiðslloysisskipanini og Barsilsskipanin, koma í gildi 1. januar 2023.

§§ 3 og 4, sum eru fylgibroytingarnar viðvíkjandi Høvuðsbarnaverndarnevndini, koma í gildi 1. juli 2023.

§§ 5-7, sum eru fylgibroytingingarnar viðvíkjandi Tvingsilsnevndini, koma í gildi 1. januar 2024.

Sambært § 18, stk. 2 í *løgtingslóg um Føroya Kærustovn* er ásett, at kæra send til kærunevnd og mál sent til nevnd, og sum ikki er avgreidd, tá ið viðkomandi kærunevnd ella nevnd verður tikin av, viðger og avgreiðir Føroya Kærustovnur eftir reglunum í løgtingslóg um Føroya Kærustovn.

Løgmansskrivstovan, xx. xx 2022

**Bárður á Steig Nielsen**
løgmaður

/ John Rajani

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Ummæli frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum.
Fylgiskjal 3. Ummæli frá Almannamálaráðnum